# Vegleiðingin til lærarar

Tími 4 — Tú fer kanska at hava eitt arbeiði, sum ikki er til enn

**Fyrireiking til tíman:**

Les alla framløguna áðrenn, so tú veitst nær tú skalt vísa filmar og hvat tilfar skal prentast áðrenn (Exercise4).

## Mynd 1

### Endamál:

Eftir tíman eiga næmingarnir at vera vitandi um, at arbeiðsmarknaðurin broytist. Teir eiga eisini at hugsa um, hvørji størv kanska verða í framtíðini. Teir fara eisini at skilja, at saman við broytingum í arbeiðsmarknaðinum, broytist arbeiðsumhvørvi eisini.

Vís nú filmin "Arbeiðsumhvørvi í Framtíðini" til íblástur.




---

## Mynd 2

### Vegleiðing

Byrja filmin.



**Endamál**

Filmurin vísir arbeiðsumhvørvið í framtíðini við at vísa fram ymisk arbeiðsumhvørvi við framtíðarelementum. Tað eigur at geva næmingunum nøkur hugskot til fylgjandi venjingarnar.

---

## Mynd 3

### Vegleiðing:

1. Vís teimum venjingarringreiðina (karusel).

2. Arbeið við ringreiðini.

**Hvussu venjingarnar skulu gerast**

Hvør spurningur skal skrivast niður á pappír.

Být næmingarnar í fýra bólkar, sum skulu sita hvør sær. Í einum stórum flokki kunnu spurningarnir tvífaldast og flokkurin býtast í tveir bólkar.

Gev síðan øllum bólkunum pappírini.

Bólkarnir skulu hava hugarok í tveir minuttir og skriva so nógv, sum tey kunnu hugsa um til hvønn spurning á pappírið. Tað er í lagi at at nýta lyklaorð. Tú heldur eyga við tíðini.




**Endamál:**

Lat næmingarnar hugsa um, hvussu vit fara at liva í framtíðini.

Áfram á næsta síðu ››

# Vegleiðingin til lærarar

Tími 4 — Tú fer kanska at hava eitt arbeiði, sum ikki er til enn

## Mynd 3 Framhald

Aftan á nakrar minuttir skulu næmingarnir skifta til næsta borð og næsta spurning. Ger hetta umaftur, til allir spurningar eru svaraðir.

Les spurningarnar hart, sum næmingarnir svara.

Spurningarnir eru í framløguni og eru merktir við teknum á pappírinum:

- (Tekin: hús) Hvussu búgva vit?

- (Tekin: mappa) Hvar arbeiða vit?

- (Tekin: flutningstól) Hvussu flyta vit okkum? (Kom við dømum um neyðugt: Er tað almenn ferðsla, við egnum bili? Samkoyring?

- (Tekin: hjarta) Hvat ávirkar okkara kenslur? (dømi: Hvussu er heilsurøktin? Hvussu eta vit? Hvat íðka vit?

Byrja ringreiðina við at biðja næmingarnar ímynda sær, at vit eru í ár 2050.

3. Tá venjingin er liðug verður eitt umboð úr hvørjum bólki biðin um stutt at taka samanum alt, sum er skrivað niður til tann spurningin.




### Endamál:

Lat næmingarnar hugsa um, hvussu vit fara at liva í framtíðini.

---

## Mynd 4

### Vegleiðing:

Næmingarnir skulu nú fáa eina løtu at hugsa um størv, sum eru broytt við tíðini og onnur, sum ikki eru broytt. Tosa við allan flokkin.

Størvini, sum tú vísir í framløguni, eru skrivað inn í eina talvu.

Tosa um fyrsta starvið, bilmekanikari, sum eitt dømi við allan flokkin.

Fyrr: At vera bilmekanikari var eitt tungt og møðandi starv, og eingin verndarútgerð var. T.d. At skifta olju

Nú: Í dag er starvið meira tengt at tøkni og elektronikki, og mátingarútgerð verður brúkt at finna feilir við. Verndarútgerð verður nýtt, tá ið ein arbeiðir við hættisligum evnum.

Í framtíðini: Í framtíðini fer bilmekanikarin at arbeiða enn meira talgilt og má hava førleikar innan tøkni. Elbilar, til dømis, hava ein heilt annan motor og kanska tað koma sjálvkoyrandi bilar?

Lat næmingarnar kjakast um hini størvini á sama hátt við allan flokkin. Vís størvini, eitt í senn.

- ein, sum arbeiðir á skrivstovu
- forskúlalærari
- sjúkrarøktarfrøðingur
- ávirkari (influencer)
- egið uppskot

Annars kunnu næmingarnir tosa um størvini í pørum ella smærri bólkum.




### Frágreiðing um tekin

Starv

Fyrr: Hvussu plagdi starvið at vera? (t.d. fyrst í 20. øld)

Nú: Hvussu er starvið í dag?

Í framtíðini: Hvussu fer starvið at vera í framtíðini?

Áfram á næsta síðu ››

# Vegleiðingin til lærarar

Tími 4 — Tú fer kanska at hava eitt arbeiði, sum ikki er til enn

## Mynd 4 Framhald

Enda kjakið við at taka samanum áhugaverdar eygleiðingar, sum flokkurin hevur gjørt.

Vís filmin, har granskarin tosar um arbeiðsumhvørvið í framtíðini.

**Frágreiðing um tekin**

Starv

Fyrr: Hvussu plagdi starvið at vera? (t.d. fyrst í 20. øld)

Nú: Hvussu er starvið í dag?

Í framtíðini: Hvussu fer starvið at vera í framtíðini?




---

## Mynd 5

### Vegleiðing:

Byrja filmin

1. Áðrenn tú byrjar filmin, minn so næmingarnar á at geva sær far um, hvat verður sagt.

2. Tak aftan á filmin tað fram, sum granskarin segði um at hava eitt sunt arbeiðslív í einum arbeiðsumhvørvi, ið broytist og enda tíman við at spyrja næmingarnar um, hvat tað týdningarmesta var, sum granskarin segði, ella hvat teir hildu var mest áhugavert við tímanum.



### Endamál:

Granskari, David Hallman, váttar, at tað torføra við hesi venjingini er at ímynda sær, hvussu lívið verður í framtíðini, og hvussu arbeiðsumhvørvi og størv fara at síggja út.

---

## Mynd 6

### Vegleiðing:

Nú er tímin liðugur og til næstu ferð kunnu næmingarnir hugsa um hendan spurningin: Hvussu hevði títt dreyma arbeiðsumhvørvi sæð út?




### Endamál:

Gev eitt innlit til næsta tíma, har næmingar fara at skapa sítt egna dreyma arbeiðsumhvørvi.